FØROYA REIÐARAFELAG

Hoyringsskriv um flyting av kvotu 18.11.2020

Føroya Reiðarafelag hevur fingið uppskot til broyting í løgtingslóg um sjófeingi til hoyring. Ein partur av hesum uppskoti snýr seg um at flyta ein part av makrelkvotuni frá 2020 til 2021, og Reiðarafelagið tekur undir við hesum parti av uppskotinum.

Tó er nú greitt, at ein lutfalsliga stórur partur av føroysku makrelkvotuni neyvan verður fiskaður í 2020. Reiðarafelagið hevur fingið uppgerð frá Vørn, ið vísir, at 22.604 tons av kvotuni ikki eru veidd higartil í ár. Afturat hesum skulu leggjast 4.260 tons, ið eru ætlað til vinnuligar royndir og verkætlanir smb. §49, stk. 1, sum ikki eru lutað út í ár. Hesin parturin av kvotuni verður tó fluttur til 2021, um lógaruppskotið verður samtykt.

Ein partur av teimum 22.604 tonsunum verða flutt til 2021, tí at hvør einstakur rættindahavari hevur møguleika at flyta upp til 10% av síni eginkvotu til 2021. Hetta er tó bert nóg mikið til at flyta ein lítlan part av tí kvotu, sum ikki er fiskað í 2020, til 2021.

Verandi lóg um sjófeingi ásetir í §34, stk. 4, at landsstýrismaðurin í serligum førum kann loyva, at meiri enn 10% av egnu árskvotuni hjá ávísum fiskifari verða flutt millum ár, og at felags árskvotur verða fluttar millum ár. Viðvíkjandi hugtakinum "serlig føri" siga viðmerkingarnar hjá vinnunevndini m.a., at *"hugsað verður her um, tá viðurskifti, sum Føroyar ikki sjálvar hava ræði á, broyta umstøðurnar at fáa kvotu til høldar á skynsaman hátt. Talan kann t.d. vera um støður, har atgongdin at fiska fiskin brádliga broytist, ella tá móttøkuorkan brádliga verður avmarkað, t.d. vegna skerda móttøkuorku í Føroyum ella landingarbann uttanlands."*

Ivasamt er tí, um landsstýrismaðurin hevur heimild at flyta so stórar nøgdir av kvotu frá einum ári til tað næsta. Eitt uppskot kundi verið, at farið verður aftur til ta orðingina, sum skotin varð upp í upprunaliga uppskotinum til lóg um sjófeingi frá Fiskimálaráðnum á heysti 2019. Har stóð: *"Landsstýrismaðurin kann loyva, at meiri enn 10% av egnu árskvotuni hjá ávísum fiskifari verða flutt millum ár, og at felags árskvotur verða fluttar millum ár."* Vinnunevndin broytti hesa orðing undir viðgerðini av uppskotinum til núverandi orðing, soleiðis at hetta bert kann gerast í serligum føri.

Heitt verður á landsstýrismannin um at bera so í bandi, at møguligt verður at flyta ein størri part enn 10% frá 2020 til 2021, soleiðis at øll tann ófiskaða kvotan kann flytast til komandi ár. Hetta kann møguliga gerast við at útvega landsstýrismannin eina víðkaða heimild sum heild, ella at ein víðkað heimild verður útvegað bert fyri árini 2020 og 2021.

Tað kann vera óheppið, um ein partur av makrelkvotuni ikki verður veiddur í 2020, og tí hevði tað helst styrkt føroysk áhugamál í samráðingunum um makrel, um kvotan verður flutt til næsta ár.

Ein stórur partur av hesum kvotum skulu rinda veiðigjald, og tað hevði komið landskassanum til góðar komandi ár heldur enn at fella burtur, og so verður einki veiðigjald rindað. Leysliga mett er talan um meira enn 20 mió. kr. í veiðigjaldi, sum hesar kvotur kunnu geva landskassanum. Eisini hevði tað havt við sær størri hýru til manningarnar og harvið eisini størri lønarskatt til landskassan. Eisini hevði tað komið reiðaríunum til góðar og møguliga meira í partafelagsskatti til landið.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Niðanfyristandandi uppgerð, sum Reiðarafelagið hevur fingið frá Vørn, vísir, hvørjar kvotur ikki eru veiddar higartil í 2020. Nevnast skal, at okkurt skip framvegis hevur kvotu at fiska makrel í ES-sjógvi í 2020, men talan er um ein lutfalsliga lítlan part av heildini, og tað broytir ikki myndina stórvegis. Fyrivarni skal takast fyri møguligum villum, men tann yvirskipaða myndin skuldi verið eftirfarandi. Hóskandi er, um Fiskimálaráðið eftirkannar hesi tøl hjá Vørn.

Ófiskað kvota í 2020 (tons)	
Nótaskip	9.202
Ídnaðarskip	1.642
Trolarar	3.199
Línuskip	619
Rækjuskip	1.033
Verksmiðjuskip	1.420
Garnaskip	125
Trolbátar 4 T	184
Ískoytisloyvir	2.840
Uppboðssøla 2018 - 3 ár	120
Uppboðssøla 2018 - 8 ár	1.960
Uppboðssøla 2019 - 3 ár	114
Uppboðssøla 2019 - 8 ár	147
Tilsamans	**22.604 tons**

Føroya Reiðarafelag